NSÍ-FS Vágar 2-0 (0-0):

# NSÍ vísti onga náði

**Veteranurin og spælandi venjarin var mest eyðsýndi vágamaðurin, tá ið liðið tapti í Runavík og samstundis vinkaði farvæl við bestu deildina**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Vágamenn stóu eftir við svartaperi, og eftir tapið í Runavík stóð greitt, at teir fara beina leið niður aftur í aðru deild*

Tað vóru tey, sum høvdu hættað sær úr Vágum og til Runavíkar fyri at fylgja við í, hvussu hótta fótbóltsliðið hjá teimum fór at standa seg. Men tað var skjótt, at tað gjørdist greitt, at bjargingarkransurin hjá vágamonnum lá í hondunum á EB/Streymi eitt sindur innari og hinumegin Skálafjørðin. FS Vágar var ongantíð verulig hóttan ímóti NSÍ.

Gestirnir høvdu í 1. hálvleiki bóltin nógv. Jens Erik Rasmussen var á framrættaða miðvallarplássinum væl upplagdur, bólttryggur og hugflogsríkur. Men tað var ikki nóg mikið. Tað var ov lítil tyngd og saft og kraft í álopspartinum. Clayton Soares var fleiri ferðir um at gerast vandamikil, men hann hevði ikki marginalirnar á sínari síðu. Onkra ferðina gloymdi hann bóltin eftir, tá ið avgerandi dragingin skuldi gerast, og aðrar ferðir var hann ov seinur at smekka til. Birgir Joensen lúrdi eitt sindur til høgru, og tað var onkra ferðina um reppið, at góði sparkiførleikin skuldi royna Jens Martin Knudsen, men tað varð ongantíð so mikið ágangandi, at tað kundi gerast hóttafall fyri heimaliðið.

Harvið var eisini veikleikin hjá FS Vágum, sum í bítandi heystarveðrinum sendi teir út í kuldan, settur í glas og rammu. Í verjupartinum vóru teir ikki nóg tryggir, á miðvøllinum var verjukendi stuðulin hjá Jens Eriki Rasmussen ikki nóg hollur, og tá ið tað viðhvørt líktist góðum samanspæli, so spurdist úrtøka ikki burturúr, tí álopsparturin var ov tunnur.

Jens Erik Rasmussen hevði góða skotroynd úti frá, sum fór dygst framvið, Clayton Soares var tætt við at umseta frísparksinnlegg, og tað var meiri av tí slagnum. Í 2. hálvleiki noyddist NSÍ miðverjin Áki L. Hansen eina ferð at beina bóltinum út til horna, tá ið hann annars var á veg í málið. Men tað bar ikki mál við sær, og tað eru tey, sum telja og geva stig og harvið lyfta lið úr vandastøðu.

### Framúr mál

NSÍ var ikki sinnað at geva nakað burtur, hóast venjarin hevði broytt liðið í fleiri ódnum. Áki L. Hansen fekk møguleikan í miðverjuni, og Messias Pereira kom undan steðginum inn fyri skadda Helga L. Petersen. Karsten From var vongverji í høgru. Hann gjørdi ikki so nógv um seg í 1. hálvleiki, men í 2. hálvleiki, tá ið NSÍ hevði fríska lotið undan, var hann fleiri ferðir ágangandi.

Seinna umfarið var eitt lítið korter gamalt, tá ið unglingaspælarin Andy Olsen legði NSÍ framum. Hann var við frá fyrsta bríksli í miðvallarplássinum í vinstru, sum skaddi Jónstein Petersen annars hevur átt. Í 2. hálvleiki fór Andy í álopið, meðan Messias fór í miðvallarplássið í vinstru.

Andy fekk bóltin stungnan fram ímillum. Vágamenninir dúvaðu upp á rangstøðuna, men linjuverjin segði einki, og so var ungi maðurin kaldur og lyfti upp um Jákup Joensen, sum kendi seg noyddan at leypa út út málinum.

Níggju minuttir seinni staðfesti Sjúrður Jacobsen heimasigurin og harvið, at FS Vágar skuldi flyta niður. Og tað var vorðið sum mál. Eftir innkast í høgru og tvørtur um og út frá, royndi vinstrabeinti vongverjin seg úr 25–30 metrum. Málverjin mundi ikki síggja bóltin beinanvegin, tí nógv fólk var fyri, og tá ið hann sá bóltin var einki at gera. Tað sang í nettakinum, tá ið bólturin var komin strúkandi dygst inn undir samankomingina.

### Dysturin í tølum

**NSÍ–FS Vágar 2–0 (0–0)**
1–0: Andy Olsen 58.
2–0: Sjúrður Jacobsen 67.
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Karsten From, Óli Hansen, Áki L. Hansen, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Ian Højgaard, Kári Hansen, Andy Olsen, Helgi L. Petersen (Messias Pereira, 44.), Sonni L. Petersen
**Gult kort:** Kári Hansen 68., Ian Højgaard 90.
FS Vágar: Jákup Joensen – Sjúrður Ellefsen, Vlad Odipov, Albert Ari Thomassen, Jóhannis Joensen (Rói Árting, 70.) – Hegga Samuelsen (Hannus Olsen, 65.), Jens Erik Rasmussen, Ruslan Screlea, Silva de Braga – Birgir Joensen, Clayton Soares

VB-B68 1-0 (0-0):

# VB syrgdi fyri sær sjálvum

**Tað sást ikki á B68 avrikinum, at teir høvdu silvurkrónurnar at spæla um, meðan mótstøðumenninir vóru í vanda fyri at flyta niður**

VB–B68
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Setningarnir vóru heit ymiskir. Á Vágseiði spældi heimaliðið leygardagin fyri at sleppa undan hóttanini av niðurflyrting. Gestirnir av Toftum vóru fríggjakvøldið komnir suður at fyrireika seg til stríð fyri at fáa silvurkrónurnar.

Tað eydnaðist hjá VB, og tað miseydnaðist hjá B68. Umstøðurnar vóru ikki til flótandi fótbóltsspæl. Tað snúði seg um at stríðast. Tað reið leingi um snarið, og tað koppaði heimaliðnum til fyrimunar. Gestirnir høvdu stórar trupulleikar at standa á beinunum á hála undirlagnum, og tað kom heilt ofta fyri, at teir meiri lógu enn stóðu.

Einasta málið skoraði altíð vandamikli Birgir Jørgensen, tá ið tað restaðu fimm minuttir eftir. Innleggið kom úr vinstru, og mitt fyri málinum smekkaði málrevurin høvdið undir bóltin, sum við nógvari ferð fór í nettakið aftanfyri Albert Sævarsson, sum ongan sum helst møguleika hevði at bjarga.

B68 hevði onkra roynd úti frá, sum Bjarni Johansen ongar trupulleikar hevði at verja fyri. Toftamenn hava seinastu ferðirnar havt trupulleikar í álopspartinum, og soleiðis var tað aftur hesa ferð. Hvørki Øssur Hansen ella Jann Ingi Petersen vóru á miðvøllinum, og tað tóktist liðið ikki megna at bera.

Tapið hevði við sær, at B68 spælararnir fingu bronsukrónurnar. Tær fara at verða handaðar á ársveitsluni hjá felagnum, sum verður nú leygarkvøldið.

### Burtur úr vanda

Vágbingar tóktust vita, hvat tað snúði seg um. Áskoðararnir stuðlaðu teimum væl, og VB spælararnir vóru meiri ágangandi, enn teir hava verið í so nógvum øðrum dystum fyrr í ár.

Undan steðginum vildu teir hava dómaran at bríksla fyri brotssparki, tí B68 verjan hevði ov gott tak á einum av álopsspælarunum, men Oddmar Andreasen bríkslaði ikki.

VB hevði onkrar skotroyndir úti frá, sum Albert Sævarsson ongar trupulleikar hevði at taka sær av. Sum heild vóru málmøguleikarnir ikki nógvir. Birgir Jørgensen fekk fulla nyttu burturúr tí eina, sum so mangur annar ikki hevði megnað at umsett til mál. At Birgir megnaði hetta var sera týdningarmikið fyri VB. Vágbingar vóru léttir, tá ið teir fóru úr kuldanum á Vágseiði og heim til heita drekkamunnin. Eftir at teir hava livað í óvissu um lagnuna hjá teirra liði í fleiri vikur, kunnu teir nú hvíla seg og vita, at teirra lið aftur komandi ár fer at fáa møguleika at vísa, at tað er ein sjálvfylgja, at VB og Vágur eru partur av fótbóltsstríðnum, har tað rættuliga gongur fyri seg.

Toftamenn fóru norður um aftur við blandaðari kenslu. Eftir eitt sindur trilvandi kappingarbyrjan og fjórða pláss í summarsteðginum vunnu teir við sjey sigrum á rað seg heilt upp á toppin. Men teir taptu gulldystin í Gundadali, tá ið mest um galt, og nú taptu teir aftur, tá ið tað ráddi um at verja silvurplássið.

### Dysturin í tølum

**VB–B68 1–0 (0–0)**
1–0: Birgir Jørgensen 85.
**Dómari:** Oddmar Andreasen
**VB:** Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Janus Kjærbo – Mortan úr Hørg, Milan Kuljic,Slobodan Madzar, Anders Sørensen, Palli Augustinussen – Birgir Jørgensen, Brian Andersen
Gult kort: Slobodan Madzar 35.
**B68:** Albert Sævarsson – Jóhan Petur Poulsen, Hans Fróði Hansen, Arnbjørn Danielsen (Mannbjørn Nesá, 78.), Jákup Eli Olsen – Bogi Petersen (Oleif Joensen, 85.), Fróði Benjaminsen, Dánial Hansen, Eyðstein Skipanes (Øssur Jacobsen, 75.) – Súni Fríði Johannesen, John Heri Dam
**Gult kort:** Oleif Joensen 85.



# Gullveitsla í Fuglafirði

**Seinasta umfarið í aðru deild var á skránni leygardagin, og meðan fuglfirðingar kundu taka sær av løttum móti**

2. DEILD
*Jákup Mørk/Jóannes Hansen*
*jakup@sosialurin.fo*
*joannes@sosialurin.fo*

Spenningurin í aðru deild var fyri tað mesta útloystur, tá seinsta umfarið var á skránni. ÍF hevur alt árið víst seg at vera í einum flokki fyri seg, og tó at teir hava tapt móti teimum báðum niðastu liðunum í deildini, so hevur oddasessurin ongantíð av álvara verið í vanda. Hvørja ferð tað hevur staðið nakað á, hava teir tvørturímóti reist seg eitt stórt fet omanfyri hini liðini, og eftir greiða sigurin á Sevmýru í heyst mundi eingin vera í iva um, hvønn vegin tað bar.

### Týdningarleysar uppgerðir

Og á seinasta leikdegi var eingin sum heilst ivi um, at ÍF var rætti vinnarin av deildini. Sumba var á vitjan, og teir sluppu bara at spæla við eina løtu. Í hálvleikinum stóð á jøvnum 1-1, men so setti ÍF ferð á, og við fimm málum á rað staðfestu teir endaligt, at talan verður um fótbólt í bestu deildini komandi ár.



*Eyðólvur Petersen við steypinum hjá ÍF. Fuglfirðingar vunnu sannførandi kappingina í aðru deild, og komandi ár skulu tei yvirtaka sessin hjá FS Vágum í bestu deildini. TB og Skála fara at stríðast um seinasta sessin*
*Mynd: Finnur Justinussen*

Næst fremsta liðið í deildini er TB, og teir løgdu ikki ov nógv fyri, tá vitjað varð á Sandoynni. Endaliga úrslitið av dystinum varð 4-0 til B71, men tað hoyrir helst við søguna, at TB her royndi at spara nakrar av vanliga føstu monnunum. Liðið hevur tveir altavgerandi dystir móti Skála fyri framman í dystinum um at fáa pláss í fyrstu deild komandi kappingarár, og so vórðu eingi óráð tikin fyri.

Í Havn høvdu B36 og B68 avgreitt sínamillum uppgerðina longu fríggjakvøldið, og her eydnðiast toftamonnum at siga farvæl við deildina við einum stigi um ikki annað. B68 var annars á odda 3-1 eitt skifti, men teir megnaðu ikki at halda fast um leiðsluna.

Í Klaksvík tók KÍ á seinasta leikdegi móti AB.

At fleiri KÍ spælarar í 1. deild vóru leikbannaðir hevði við sær, at onkrir av stuðulsspælarunum á næstbesta KÍ liðnum vóru í Gundadali. Tí var miðalaldurin á liðnum í Klaksvík rættuliga lágur. Meiri enn helmingurin av spælarunum hava unglingaaldur, og teir stóðu seg væl. Hetta er kanska eitt sindur undarligt, tá ið havt verður í huga, at KÍ unglingarnir ikki megnaðu at spæla seg víðari í FM kappingina. Men tað hevur ikki verið fyrr enn eftir summarsteðgin, at skil er komið á unglingaliðið, sum vann kappingina í heyst millum B36, LÍF, NSÍ og KÍ. At evnaríku unglingarnir fingu tað at rigga sum lið eigur ikki minst nýggi venjarin hjá teimum – hann var eisini á beinkinum leygardagin – Jóan Pauli Jacobsen heiðurin fyri. Eftir lestrarár á flatlondum er hann í summar komin aftur til Klaksvíkar.

KÍ hevði fleiri málmøguleikar ímóti AB, men tað eydnaðist bara eina ferð at fáa mál. Marius Nystrøm, sum var miðvallari í vinstru, stýrdi tætt undir málinum eftir innlegg úr høgru, sum var farið framvið fleiri við– og mótstøðumonnum, bóltinum í málið. Tá restaðu tað tjúgu minuttir.

### LÍF skal spæla fyri lívinum

Einasti dysturin, sum hevði nakað veruligt uppá seg, varð leiktur í Vági leygardagin. Har var LÍF á vitjan, og undan uppgerðini stóð greitt, at taparin av dystinum varð partur av seinastu báðum dystunum um upp- og niðurflyting millum aðru- og triðju deild.

Og her eydnaðist VB at vinna. VB hevði fyri tað mesta eina trygga leiðslu í dystinum, men seinastu løtuna løgdu gestirnir nógv fyri, men nóg mikið varð tað ikki. Og soleiðis noyðast leirvíkingar nú at leingja kappingarárið nakað, áðrenn teir kunnu fara í vetrarfrí.

### Úrslit

B68-B36 3-3
B71-TB 4-0
ÍF-Sumba 6-1
KÍ-AB 1-0
VB-LÍF 4-3

GÍ-B36 1-4 (0-3):

# Silvur í stormi

**B36 togaði seg á seinasta leikdegi fram á silvurplássið, tá teir enn einaferð vístu, at teir trívast væl í vindi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrr varð ofta tikið til, at regn og vindur var B36-veður. Undir hesum búði tann sannroynd, at B36 í fimti- og seksti árunum mundi hava eitt hitt best stríðandi liðið, og at teir tí ofta stóðu seg best, tá fótbóltslíkindini ikki vóru av teimum allar bestu.

Og okkurt bendir á, at hetta framvegis er støðan. Í øllum førum hevur B36 nú tveir útidystir á rað vunnið truplar dystir í sonnum ódnarveðrið, og í so máta kunnu tey í árstalsfelagnum bara iðra seg um, at veðrið var somikið gott, tá dysturi móti HB var á skránni.

### Gjørdu skjótt av

Í Gøtu sunnudagin var tað B36, sum hevði vindin undan, og fyri steðgin høvdu teir við trimum málum at kalla punktera allan spenning í dystinum.

Fyrsta málið var eisini ein beinleiðis avleiðing av vindinum. Heðin á Lakjuni sendi horna innfyri, og uttan stórvegis hóvasták tók vindurin bóltin beint í meskarnar.

B36 helt á at trýsta, og tvær ferðir afturat fyri steðgin øktu teir um munin. Fyrst var tað Allan Mørkøre, sum í seinastu gerð síni hetta árið fór einsamallur gjøgnum GÍ-verjuna, áðrenn hann potaði í málið. Í skotroyndini fekk Allan samstundis ein vøddaskaða í lærið, og so var kappingarárið liðugt fyri hansara viðkomandi. Og stutt eftir var tað Jens Kristian Hansen, sum gjørdist púra leysur og rundaði málverjan, áðrenn bólturin at enda varð sendur í netið.

Og eftir steðgin tóktist B36 bara at halda fram. John Petersen økti til 4-0, og møguleikin var eisini til 5-0, tá B36 fekk brotsspark. Jákup á Borg royndi tó at verða dekan og smartur, tá hann heldur enn at skjóta móti málinum bara gav bóltinum eitt lítið skump. Jens Kristian Hansen kom nevnliga rennandi aftanfyri, men tá hann skeyt beint í krovið á málverjanum, og so var tann royndin av ongum.

Ístaðin var tað GÍ, sum fram móti dystarenda kundi seta punktum fyri dystin, tá Gidek sendi fríspark beinleiðis í netið.

### Ov stuttir

B36 kundi eftir dystin staðfesta, at teir við hesum høvdu vunnið seg upp á næstovasta sessin á stigatalvuni, nú B68 einki fekk í Vági. Sum so mundi tað eisini vera ein lítil troyst, men tað er tó eingin loyna, at talan alt í alt var um vónbrotnar leikarar, sum fingu heiðursmerkini hongd um hálsin. Frá byrjan varð lagt upp til, at hetta liðið skuldi vera tað sterkasta í landinum, men alt ov ofta høvdu mongu stjørnurnar á liðnum ilt við at finna saman til eina heild.

GÍ endaði árið á sjeynda plássinum við lakastu úrtøkuni, sum teir hava havt í fyrstu deild. Einki er tó at taka seg aftur í, at marginalarnir so avgjørt ikki hava verið við liðnum hetta kappingarárið. Skaðarnir hjá lyklaleikarum hava verið bæði nógvir og drúgvir, og so hevur unga manningin ikki havt neyðugu tyngdina til at halda liðnum har, sum teir vanliga meta seg hoyra heima. Í steypakappingini gjørdist tað tó til silvur, men hóast hetta man vera ein troyst, so var tað ikki nóg mikið at senda liðið út aftur í Europa komandi kappingarár.

### Dysturin í tølum

**GÍ-B36 1-4 (0-3)**
0-1: Heðin á Lakjuni, 11
0-2: Allan Mørkøre, 21
0-3: Jens Kr. Hansen, 28
0-4: John Petersen, 71
1-4: Zdzislaw Janik, 90
**GÍ:** Hallur Hansen – Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Kaj ennigarð, Leivur Hansen – Súni Olsen, Zdzislaw Janik, Símun Samuelsen, Áslakur R. Petersen – Hans Pauli Petersen, Bárður á Lakjuni
**B36:** Tróndur Vatnhamar – Allan Mørkøre, Pól Thorsteinsson, Rúni Elttør, Sverrir Kjærbo – Niels Joensen, Klæmint Matras, Jens Kristian Hansen – John Petersen, Jákup á Borg, Heðin á Lakjuni

# Neistin nýggjan høvuðsstuðul

**Komandi tvey árini verður Føroya Tele høvuðsstuðul hjá elsta hondbóltsfelagnum í landinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta er fyrstu ferð, at Føroya Tele er høvuðsstuðul hjá einum hondbóltsfelag, men seinnu árini hevur tað tó verið alt meira vanligt, at stóru fyritøkurnar í landinum hava valt at stuðlað ítróttafeløgum.

Richard Mortensen, marknaðarleiðari hjá Føroya Tele, segði á fundinum, at hetta við sponsoravtalum er ein heldur øðrvísi háttur at lýsa uppá.

- Her hevur tú møguleikan at fanga potentiellar kundar, meðan tey eru í eini avslappaðari støðu, og tað í sjálvum sær kann virka positivt.

- Hartil er tað eisini okkara fatan, at Neistin sum ítróttafelag hevur nøkur virði, sum vit eisini vilja seta í samband við okkum sjálvi. Eitt nú eru tey aloftast við í kappingini um at vera best og størst, og ikki minst sýnir felagið við ungdómsarbeiði sínum atlit til persónliga menning.

Neistin hevur annars lagt nógv fyri, nú felagið brynjar seg til eitt nýtt ár. Hjá monnunum hevur felagið fingið tilgongd av stórskjúttanum, Dragisa Stojovic, umframt einum í føroyskum høpi nýggjum útlendingi, sum eitur Buha Blagoje.

Hjá kvinnunum er Lina Andriulyte úr Litava nýggjur útileikari, umframt at Linda á Dunga er komin heim úr lestrarørindum at verja málið.